# Javnaðarflokkurin vísir dirvi, virðing og álit

TINGBÓLKUR JAVNAÐARFLOKSINS

Nú førir Tjóðveldi áhaldandi fram í fjølmiðlunum, at Javnaðarflokkurin ikki hevði dirvi at „rudda“ upp eftir ABC samgonguna. Vilja bert loyva okkum at koma við nøkrum faktuellum rættingum.

Sum dømi kunnu vit nevna útlendingalógina. Tá ið CHE samgongan var skipað, legði landstýriskvinnan hjá Javnaðarflokkinum lógina fram, fekk breiða undirtøku fyri henni, og Javnaðarflokkurin fekk málið loyst. Hetta gjørdi Javnaðarflokkurin, tí vit hildu tað var rætt og neyðugt, hóast harðan ágang frá fakfeløgum og nógvum av trúgvu stuðlum floksins.

Tjóðveldi slongdi út, at fiskidagarnir skuldu skerjast við 50% komandi fiskiár. Sama morgun sum 3. viðgerð var, kom Torbjørn Jacobsen við eini framløgu fyri nøkrum fáum tilvildarligum tingfólkum. Henda framløga kundi verið tað, ið gjørdi, at fólk skiltu hetta stórpolitiska málið. Tilmælið frá minnilutanum i vinnunevndini, har Javnaðarflokkurin ikki hevði umboð, var at skerja fiskidagarnar við 20%. Har var ongin frágreiðing um, hví man fór úr 50% niður á 20%. Men tá atkvøðast skuldi, vísti Tjóðveldi hvørki dirvi ella virðing fyri samgonguni. Tí, øll tingmanning Javnaðarfloksins atkvøddi fyri. Men hvat gjørdi Tjóðveldi ? Ein atkvøða fyri og restin blankt.

Í samband við avtalaða niðurskurin av blokkinum royndi Javnaðarflokkurin, í ljósinum av búskaparstøðuni, at fáa eitt tjak í samgonguni um, nær blokkurin skuldi skerjast. Á fyrstu síðu í samgonguskjalinum stendur, at atlit skal takast til búskaparstøðuna. Men gakk - at síggja veruleikan hjá vanliga føroyinginum, tað er ógvuliga trupult fyri leiðsluna í Tjóðveld. Har var onki at tosa um, hóast fleiri limir í Tjóðveldinum søgdu, at tey vóru ímóti at lække blokkin beint nú. Síðan boðaði Sjálvstýrisflokkurin frá, at teir hildu ikki tað vera rætt at minka blokkin, sum búskaparstøðan nú er. Hevði CHE samgongan yvirlivað, so eru vit vís í, at Tjóðveldi hevði lurtað eftir teimum. Tað tóktist, sum virðingin hjá leiðsluni í Tjóðveldinum alt samgonguskeiðið, var størri fyri Sjálvstýrisflokkinum enn virðingin fyri sjónarmiðum Javnaðarfloksins.

Alt tos um, at Javnaðarflokkurin hevur ikki dirvi, er tað reina uttanumtos. Munurin millum Tjóðveldi og Javnaðarflokkin er, at vit hava virðing fyri og álit á teimum, ið vit samstarva við.

Vit høvdu torað at sagt, at skerjingin av blokkinum kann bíða eitt ár ella tvey. Vit høvdu jú eina avtalu, eitt samgonguskjal, ið vit ætlaðu at halda.

Ein høpisleys skerjing av blokkinum við 117 milliónum, meðan heilsuverk og almannaverk mátti bløða fyri skerjingina, tað hevði verið ringt at fingið nakran føroying at skilt, eisini tey ið velja Tjóðveldi.

Samanumtikið halda vit, at leiðslan í Tjóðveldi eigur at taka í egnan barm, og nýta orkuna til at fáa samstøðu innanhýsis í egnum flokki, millum annað í málinum um blokkniðurskurðin, fiskivinnu- og landbúnaðarpolitikkinum.

# Politikkur og ikki formalitetur

JÓANNES EIDESGAARD
løgmaður



Lat meg gera púra greitt, at Tjóðveldi varð sagt upp av politiskum og ikki av formalistiskum orsøkum.

Uttan mun til skrivstovur og alt annað, so snýr málið um uppsøgnina av Tjóðveldinum seg um, at eg sum løgmaður ikki longur havi álit á Høgna Hoydal, formanni Tjóðveldisins. Tá er bert eitt at gera, og tað er at siga samstarvið upp.

Alt samstarv byggir jú í botn og grund á álit millum partar, og er hetta álit ikki til staðar, so ber ikki til at samstarva. Ber ikki til at samstarva, so ber heldur ikki til at fremja úrslit og náa málum.

Sjálvandi kann verða spurt, hví eitt álit fer. Í hesum førinum er talan um, at álitið okkara millum støðugt hevur verið niðurbrotið frá byrjan av í samgonguskeiðnum.

Tað er bara spell, tí eg hevði avgjørt aðrar ætlanir. Eg valdi meira ella minni persónliga at broyta samgongu eftir valið, og er hetta væl besta prógv um, at eg vísti Høgna Hoydal fult álit.

Álitið var har frá byrjan, men er nú burtur.

Fjølmiðlar hava nú í lítla viku gjørt nógv burturúr skrivstovumálinum. Tað kann sjálvandi vera áhugavert og kanska undirhaldandi fyri nøkur. Men vit mugu ikki gloyma burtur í øllum meldrinum, at orsøkin til uppsøgnina var tørvandi álit, har skrivstovan var ein av týðandi brikkunum í spælinum.

Men vil Høgni Hoydal halda lív í skrivstovumálinum, so haldi eg, at hann skal leggja sak ímóti mær ella fáa málið sett á skrá í landsstýrismálanevndini. Tað vil eg faktisk fegin hava av fleiri orsøkum. M.a. tí, at tað hevur staðið á hjá fjølmiðlum og eisini ávísum løgfrøðingum at hava rætta grundarlagið fyri teirra tulkingum.

Eg havi kannað málið hjá mínum løgfrøðiliga ráðgeva, og Høgni Hoydal hevur umbiðið eitt notat frá sínum løgfrøðingi. Ein triði er so frammi í útvarpinum í dag. Hetta hevur neyvan gjørt uppfatanina hjá borgaranum greiðari, kanska tvørturímóti.

Tað er vanlig kent, at tá politiskar grundgevingar tørva, so er rættiliga umráðandi at fáa sett fokus á løgfrøðiligar grundgevingar – flyta málið úr politiska rúminum og inn í formalitetirnar.

Men uttan mun til, hvat hendur í rætti ella hjá einum kanningarstjóra, so broytir tað ikki mína støðu viðvíkjandi álitinum. Málið er av politiskum og ikki formalistiskum slag. Málið snýr seg snøgt sagt um álit.

Hetta er fokið, og tí er Tjóðveldi uppsagt.

# Høgni roynir at turka innanfloks ósigur av upp á løgmann

KATRIN DAHL JAKOBSEN
løgtingskvinna



Í sambandi við málið um fiskidagarnar gjørdi Høgni Hoydal fleiri ferðir greitt, bæði frá tingsins røðarapalli og í fjølmiðlunum, at hetta mál var at rokna sum ein kabinettspurningur. Stóð ein samlaður tingbólkur ikki aftan fyri uppskotið frá teirra egna landsstýrismanni, var Tjóðveldi ikki at rokna sum ein stjórnarberandi flokkur, og hetta tí sjálvsagt skuldi fáa avleiðingar.

Tá málið kom til endaliga viðgerð í tinginum, vísti tað seg, sum øll vita, at Tjóðveldi ikki megnaði at standa saman. Saman við andstøðuni legði ein av tinglimum floksins fram eitt mótuppskot, sum varð samtykt. At úrslitið av hesum fór at verða, at Tjóðveldi fór úr samgonguni, mundi fáur ivast í - væl at merkja, um orðini hjá formanninum skuldu takast fyri fult. Men tað vísti seg seinri, at hesum var eingin orsøk til.

Eftir hendingina í tinginum skuldi floksleiðslan formliga taka undir við floksformanninum, men tað hendi ikki. Floksleiðslan vildi ikki nýta hetta sum orsøk fyri at slíta nakra samgongu.

Høgni Hoydal kom sostatt í eina keðiliga støðu, og skuldi hann taka orðini í seg aftur, mátti ein syndabukkur finnast, og tað er nú blivið løgmaður. Tí nú er frágreiðingin frá tjóðveldisformanninum, at løgmaður hevði bønað og biðið hann um ikki at fara úr samgonguni, og hesum eftirlíkaði hann.

Veruleikin er bara ikki so. Løgmaður hevur ikki bønað og biðið Høgna um ikki at slíta samgonguna. Øll væntaðu vit sjálvandi, at floksleiðslan hjá Tjóðveldinum tók undir við formanninum og fór úr samgonguni. Men Høgni hevði forroknað seg. Veruleikin bleiv tann, at Høgni tapti eina innanhýsis uppgerð í flokkinum, sum hann var alt annað enn erpin av, og sum hann nú roynir at turka av uppá løgmann.

# Ættleiðingarfelagið kann gleða seg

HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður



Í februar í ár var Ættleiðingarfelagið á fundi við meg. Felagið fekk tá tilsøgn um, at stuðulin til ættleiðing fór at verða hækkaður munandi. Men sjálvandi treytað av, at politisk undirtøka fekst fyri uppskotinum.

Formaðurin í felagnum sigur seg nú harmast og ótolnast, hvar uppskotið blívur av.

Politisk undirtøka er frá øllum flokkum fyri at hækka stuðulin. Lógaruppskotið er gjørt og hevur verið til hoyringar og lógartekniskt eftirlit, og tað skuldi verið lagt fyri á landsstýrisfundi nú mánadagin tann 22. í hesum, og hagani borin niðan í løgtingið.

Men nú samráðingar eru um skipan av nýggjari samgongu og landsstýri kunnu lógaruppskot ikki avgreiðast.

Tó tað er so bara ein spurningur um at fáa skipað landsstýrið av nýggjum, so vænti eg, at komandi